## Børge stjórnar Tórsvølli



Poul Michelsen boðaði longu fyri einum ári síðani frá, at hann tá var farin undir seinastu setu sína sum formaður fyri Tórsvøll. Poul hevur øll árini verið valdur sum umboð fyri Tórshavnar Kommunu, og nú nýggj nevnd skuldi veljast, skuldi nýtt umboð finnast fyri Havnina. Nýtt er kanska dekan ov nógv sagt, tí valið fall á Børge B. Hansen. Børge hevur øll árini verið ein av høvuðsmonnunum handan Tórsvøll, og hann hevur eisini átt sín sess í nevndini sum umboð fyri landsmyndugleikarnar.

## Arnbjørn heim uttan sáttmála

Toppskjúttin í Formuladeildini, Arnbjørn Hansen, vandi í farnu viku við superligaliðnum hjá OB, sum leitar eftir einum málskjútta. Tað spurdist tó eingin sáttmáli burtur úr hjá Arnbjørn Hansen. - Hann er ein góður spælari. Nú hugsa vit eitt sindur um tað, og so seta vit okkum í samband við umboðsmannin hjá honum. Men tað er ikki soleiðis, at vit vilja gera sáttmála við hann beinanvegin, sigur Lars Olsen, venjari hjá OB, við heimasíðuna við bold.dk. Teir í EB/Streymi fegnast helst um, at Arnbjørn Hansen ikki fer nakran veg beint nú. Sunnudagin skoraði Arnbjørn sigursmálið í toppdystinum ímóti HB.

# Má ikki henda aftur

**FSF-forsetin hevur illa hug at gera viðmerkingar til Aganevndarúrskurðin í málinum um Magnus Olsen. Hinvegin sigur hann, at FSF má laga seg eftir Aganevndini, og tí broyta teir nú reglurnar. Tó við einum lítlum trygdarventili, so eingin »Magnus« verður afturat í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At málið um spæliloyvi hjá Magnusi Olsen endaði á borðinum hjá Aganevndini, komst av, at FSF í fyrsta umfari vísti málinum frá sær. Hetta við grundgeving um, at spælarin var sáttmálabundin, og at talan tí var um spurning millum B71 og B36. Og vildi B71 ikki sleppa manninum, so var tað støðan.

Úrskurðurin hjá Aganevndini var tó ikki í samsvari við hetta. Har varð víst á FIFA-reglurnar, sum áseta, nær ein spælari ikki longur verður roknaður sum áhugaspælari, og við hóast hesar ásetingar ikki vóru í FSF-lógarverkinum, so staðfesti Aganevndin hesa rættarstøðu. Hetta við teirri grundgeving, at FSF er álagt at fylgja reglunum hjá altjóða fótbóltssamgonguni.

Og tað er við støði í hesum, at FSF nú hevur gjørt nýggja reglugerð, sigur FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu.

- Vit eru noydd at taka støði í úrskurðinum hjá Aganevndini, og tað er ikki okkara uppgáva at seta spurnartekin við hetta. Tí hava vit gjørt nýggja reglugerð, har vit presisera, nær talan er um áhugaspælara ella ikki, soleiðis at feløgini eru greið um hetta.

### Forða endurtøku

*Men samstundis siga tit, at reglurnar ikki av álvara koma í gildi fyrr enn eftir hetta kappingarárið. Er tað ikki ein staðfesting av, at B71 hevði rætt í sínum páhaldi? Og skinklar rættarstøðan hjá feløgunum ikki, tá fatanin av reglunum somikið brádliga verður broytt?*

- Tað kanst tú siga. Veruleikin er tó, at vit hava havt nakrar reglur, og vit hava havt okkara fatan um, hvussu hesar hava virkað. Tá Aganevndin, sum er omanfyri okkum í so máta, hevur eina aðra fatan, má hendan takast til eftirtektar. Tí vit mugu virða valdsbygnaðin innan FSF.

- Hinvegin hava vit við hesi reglugerðini tryggjað, at eitt líknandi mál ikki hendir aftur í ár. Verður støði tikið í viðgerðini av málinum um Magnus Olsen, so kundi hetta viðført, at okkurt felag varð púrasta lensað fyri spælarar í summarsteðginum. Spælarar, sum felagið annars helt seg hava sáttmála uppá. Og tí vandanum hava vit nú forðað fyri.

*- Vit hava ikki annað væl enn at akta Aganevndina, og so mugu vit smíða okkara reglugerðir eftir hesum, sigur FSF-forsetin*



# Metstór veddingarupphædd



*Heðin Mortensen var ein av drívmegunum, tá føroyingar fingu lut í donsku veddingarpengunum. Hesa ferð var seinasta ferðin, at hann tók ímóti stóra kekkinum vegna ÍSF*

**Sp/f Ítróttavedding hevur útlutað meira enn 9 milliónir krónur í veddingar pengum til barna- og ungdómsarbeiði í Føroyum. Hetta er ein góð hálv millión meira enn í fjør**

VEDDING
*tíðindaskriv*

Størsta krónuupphædd nakrantíð av veddingarpengum er útlutað til barna- og ungdómsarbeiði í Føroyum. Á ársaðalfundi í Sp/f Ítróttavedding sunnudagin varð samtykt at lata tilsamans 9,1 mió. kr. í veddingarpengum.

- Upphæddin í ár er hin størsta, ið higartil er útlutað. Vit fegnast um at kunna lata so mikið nógv í veddingarpengum, tí vit vita av royndum, at pengarnir koma sera væl við hjá móttakarunum", sigur Petur Elias Petersen, stjóri í Sp/f Ítróttavedding.

Í fjør vórðu 8,5 mió. kr. útlutaðar í veddingarpengum frá Sp/f Ítróttavedding.

Upphæddin, sum verður lutað út, skiftir eitt sindur frá ári til árs, alt eftir hvussu íðnir føroyingar eru at vedda og spæla hjá Danske Spil.

Petur Elias Petersen heldur, at ein orsøk til størru upphæddina í ár er, at spælandi og veddandi føroyingar eru vorðnir meira tilvitaðir um, at veddingarpengar hjá Danske Spil koma føroyskum virksemi til góða.

Pengarnir fara, sum vanligt er, til Ítróttasamband Føroya (ÍSF), Føroya Ungdómsráð (FUR) og Mentamálaráðið (MMR). Hetta eru partarnir, ið varða av barna- og ungdómsarbeiði í landinum. Ársins veddingarpengar verða býttar soleiðis millum móttakararnar: Mentamálaráðið og Føroya Ungdómsráð fáa 1.819 tkr. hvør, og ÍSF fær 5.457 tkr.